betri pensjón

# Kostnaðarroknskapur ÁKK og ÁKP fyri 2023

## Innihald


Inngangur ..... 2

Váttan frá Betri Pensjón ..... 2

Váttan frá óheftum grannskoðara um uppgerð av ÁKK og ÁKP ..... 3

Nýttur háttur ..... 6

Avstemmingartalva ..... 10

## Inngangur

Endamálið við at upplýsa ÁKP og ÁKK er at vísa okkara kundum teirra samlaða kostnað av at vera við í eftirlønarskipanini hjá Betri Pensjón.

Í útrokningini eru kostnaðir til bæði fyrisiting og íløgur tiknir við. ÁKK er ein krónuupphædd – Árligur kostnaður í krónum. ÁKP vísir eitt lutfall í prosentum, sum eru árligu kostnaðirnir í krónum í prosentum av goymsluni hjá tí einstaka kundanum við ársenda. Allir kundar hjá Betri Pensjón eru knýttir at marknaðarrentu sáttmálum.

## Váttan frá Betri Pensjón

Felagið hevur dags dato lagt fram kostnaðarroknskapin, sum fevnir um ”nýttan hátt” fyri uppgerð og ”avstemmingartalvu” fyri roknskaparárið 2023.

Tað er okkara fatan, at ”nýttur háttur” og ”avstemmingartalvan” eru gjørd í samsvari við ”Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser”, dagfest 15.09.2023.

Tað er somuleiðis okkara fatan, at útrokningin av ÁKK og ÁKP og tey val av uppgerðarhættum, sum greitt er frá í ”nýttum hátti”, eru í samsvari við ”Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser”, dagfest 15.09.2023, herundir útrokningin av ÁKK og ÁKP.

At enda er tað okkara fatan, at avstemmingin millum samanteljingina av ÁKK hjá hvørjum einstøkum kunda og ársroknskapin, umframt aðrar skrásetingar hjá felagnum, eru gjørdar í samsvari við ”Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser”, dagfest 15.09.2023.

Tórshavn, tann 15. august 2024

Betri Pensjón

Helgi Lamhauge Petersen

Stjóri

# Váttan frá óheftum grannskoðara um uppgerð av ÁKK og ÁKP

## Til leiðsluna í Betri Pensjón

### Niðurstøða

Vit hava grannskoðað kostnaðarroknskapin, sum fevnir um "nýttan hátt" fyri uppgerð, avstemmingartalvu, harundir útrokning og sundurlutan av kostnaðum í sambandi við uppgerð av ÁKK (árligir kostnaðir í krónum) og ÁKP (árligir kostnaðir í prosentum) fyri Betri Pensjón fyri roknskaparárið 2023.

Kostnaðarroknskapurin er gjørdur samsvarandi "nýttan hátt" fyri uppgerð og "Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser", dagfest 15.09.2023.

Kostnaðarroknskapurin er dagfestur 15.08.2024. Avstemmingartalvan vísir hesar høvuðspostar:

| | t.kr |
|---|---:|
| Samanteljing av ÁKK til kundarnar (Postur 1) | 19.100 |
| Kostnaðir í alt (Postur 18) | 19.100 |
| Munur millum Post 1 og Post 18 | 0 |

Tað er okkara fatan, at kostnaðarroknskapurin í øllum týðandi lutum er gjørdur samsvarandi "Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser", dagfest 15.09.2023

### Grundarlag fyri okkara niðurstøðu

Vit hava grannskoðað samsvarandi altjóða standardum fyri grannskoðan og eyka krøvum, sum eru galdandi í Føroyum, umframt " "Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser", dagfest 15.09.2023.

Okkara ábyrgd sambært hesum standardum og krøvum er nærri lýst í hesi váttan í pettinum "Ábyrgd grannskoðarans fyri grannskoðanini av kostnaðarroknskapinu" niðanfyri. Tað er okkara fatan, at tey grannskoðaraprógv, vit hava fingið, eru nøktandi og egnað at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

**Óheftni**

Vit eru óheftir av fyritøkuni samsvarandi leiðreglum fyri etiskan atburð hjá grannskoðarum í International Ethics Standards Board for Accountants (IESBA Code) umframt teimum eyka krøvum, sum eru galdandi í Føroyum, eins og vit halda okkara etisku skyldur samsvarandi krøvum og IESBA Code.

**Áherðsla á viðurskifti í kostnaðarroknskapinum – nýttur háttur**

Vit vísa til nýttan hátt fyri uppgerð av ÁKK og ÁKP. Kostnaðarroknskapurin er gjørdur við tí fyri eyga at vísa kundum felagsins, hvørjir kostnaðir verða rindaðir fyri eftirlønarskipanirnar hjá kundunum. Uppgerðin fevnir um samanteljing av kostnaðum, sum kundarnir rinda, svarandi til teir samlaðu kostnaðirnar, sum kundarnir rinda felagnum. Av hesi orsøk kann kostnaðarroknskapurin vera óegnaður at nýta til onnur endamál.

Okkara niðurstøða er ikki tillagað í sambandi við hesi viðurskifti.

**Áherðsla á viðurskifti viðvíkjandi grannskoðanini – ÁKK/ÁKP**

Grannskoðanin av ÁKK/ÁKP hevur fevnt um eina samanbering av samanteljingini av kostnaðum í posti 1a í avstemmingartalvuni við teir samlaðu kostnaðirnar, sum eru í uppgerðini av ÁKK/ÁKP til kundarnar. Uppgerðin av ÁKK/ÁKP til teir einstøku kundarnar er ikki fevnd av okkara váttan.

Okkara niðurstøða er ikki tillagað í sambandi við hesi viðurskifti.

**Ábyrgd leiðslunnar av kostnaðarroknskapinum**

Leiðslan hevur ábyrgd av at gera kostnaðarroknskapin í samsvari við "nýttan hátt" fyri uppgerð umframt "Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser", dagfest 15.09.2023.

Leiðslan hevur harumframt ábyrgd av tí innanhýsis eftirliti, sum leiðslan metir vera neyðugt fyri at gera kostnaðarroknskapin uttan týðandi feilupplýsingar, uttan mun til, um hetta skyldast sviki ella feilum.

**Ábyrgd grannskoðarans fyri grannskoðanini av kostnaðarroknskapinum**

Tað er okkara mál at fáa høga vissu fyri, um kostnaðarroknskapurin sum heild er uttan týðandi feilupplýsingar, uttan mun til, um hetta skyldast sviki ella feilum, og at geva eina váttan við eini niðurstøðu. Høg vissa er eitt høgt støði av vissu, men er ikki nøkur trygd fyri, at ein grannskoðan, sum verður gjørd samsvarandi altjóða standardum fyri grannskoðan og eyka krøvum, sum er galdandi í Føroyum, umframt "Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser", dagfest 15.09.2023, altíð staðfestir týðandi feilupplýsingar, tá slíkar eru til staðar.

Feilupplýsingar kunnu íkoma sum avleiðingar av sviki ella feilum og kunnu roknast sum týðandi, um tað sannlíkt kann væntast, at teir hvør sær ella saman hava ávirkan á fíggjarligar avgerðir, sum brúkari tekur við støði í kostnaðarroknskapinum.

Sum liður í grannskoðan, sum verður gjørd eftir altjóða standardum fyri grannskoðan og eyka krøvum, sum eru galdandi í Føroyum, umframt ”Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser”, dagfest 15.09.2023, gera vit yrkisligar metingar og halda yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini, har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta váðar fyri týðandi feilupplýsingum í kostnaðarroknskapinum uttan mun til, um hetta stendst av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiði, sum hesir váðar krevja, umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi og egnað at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi feilupplýsingar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi feilupplýsingar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.
- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina av innanhýsis eftirlitinum.
- Taka støðu til, um tann háttur, sum leiðslan hevur nýtt og lýst í pettinum ”Nýttur háttur” fyri uppgerð av ÁKK og ÁKP, er hóskandi og um tær metingar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur lýst og nýtt, eru rímiligar.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið fyri ætlaðu grannskoðanina og nær grannskoðað verður og eisini um týðandi avdúkingar, harundir um møguligar týðandi manglar í innannhýsis eftirlitinum, sum vit hava eyðmerkt undir grannskoðanini.

Tórshavn, tann 15.08.2024

**P/F Januar**
løggilt grannskoðanarvirki

Christina á Bøgarði
statsaut.revisor

# Nýttur háttur

Kostnaðarroknskapurin er gjørdur í samsvari við nýttan hátt fyri uppgerð og "Aftale mellem de færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser om indførelse af årlige omkostninger i kroner (ÅOK) og årlige omkostninger i procent (ÅOP) for færøske livsforsikringsselskaber og tværgående pensionskasser", dagfest 15.09.2023.

Íløgurnar verða í høvuðsheitum røktar av goymsluumsitarum og fyrisitingar- og handilskostnaðir verða trektir frá, áðrenn avkastið verður tilskrivað íløgunum. Um felagið fær afturbering frá goymsluumsitara, verður afturberingin lutað kundunum við tí partinum, sum kundarnir hava gjørt íløgu í. Kundans partur av afturberingini verður tilskrivaður honum afturat avkastinum.

ÁKP hjá hvørjum einstøkum kunda er roknað sum lutfallið millum ÁKK hjá kundanum og uppsparingina ultimo hjá kundanum (+ tann partin av møguligum ikki býttum avsetingum, sum kundin eigur), tó soleiðis at hædd verður tikin fyri, at ultimo uppsparingin hjá einum kunda kann stava frá bæði skattaðum og óskattaðum inngjøldum. Í hesi útrokning eru nakrar metingar gjørdar, sum eru eins fyri allar kundar og fyri øll eftirlønarfeløg- og grunnar. Hesar metingar eru ein roynd at vísa veruligu viðurskiftini, men hetta kann ikki gerast til fulnar, og tí kunnu munir vera millum, hvussu neyvt ÁKP lýsir kostnaðarprosentið hjá hvørjum einstøkum kunda.

Fortreytirnar eru ætlaðar at spegla veruliga lutfallið, men kunnu ikki gera hetta til fulnar, og tí kunnu munir vera millum, hvussu neyvt ÁKP endurspeglar kostnaðarprosentið hjá tí einstaka kundanum.

ÁKK pr. kunda verður deilt á kostnaðir, ið ávíkavist broytast og ikki broytast samsvarandi støddini á goymsluni: Broytiligir kostnaðir (svarandi til kundans einsæris part av summinum av posti 9 til 12 + broytiligi parturin av posti 17 í avstemmingartalvuni). Óbroytiligir kostnaðir (svarandi til kundans einsæris part av posti 2 til 8 og 13 til 16 plus óbroytiligi parturin av posti 17 í avstemmingartalvuni).

Felagið bjóðar bert íløgur til marknaðarrentu og tí er tað ikki viðkomandi at rokna og nýta býtislykil í sambandi við sundurbýting millum miðalrentu og marknaðarrentu.

## ÁKK til kundarnar

**1a – Summurin av ÁKK upplýst kundunum**

Posturin inniheldur samlaða summin av kostnaðum upplýstir kundunum.

**1b – Summurin av ÁKK býtt út á kundar, sum antin eru farnir úr felagnum, ella har eftirlønarskjalið er skrásett sum endað**

Posturin inniheldur summin av kostnaðum til teir kundar, ið eru farnir úr felagnum í árinum og tí ikki kunnu fáa upplýst eitt ÁKK og ÁKP í eini ársuppgerð. Kundar við eini samansparing á 100 kr. og minni eru eisini við í hesum talinum, tí hetta eru kundar, hvørs samansparingaravtala er undir avtøku.

**1c – Summurin av ÁKK fyri avtalur, har ÁKK ikki er viðkomandi**

Posturin inniheldur summin av ÁKK fyri avtalur, har ÁKK ikki er viðkomandi. Í posti 1c eru: 1) váðatryggingar, ið ikki eru knýttar at eini eftirlønarskipan 2) SVL kostnaðir, ið ikki eru knýttir at eini eftirlønarskipan og 3) SVL- og váðatryggingar, ið ikki eru knýttar at eini eftirlønarskipan og har kostnaðurin verður rindaður av kjarnufæfeinginum.

**1d – Summurin av ÁKK, sum enn ikki er upplýst**

Hesin posturin inniheldur summin av ÁKK fyri kundar, sum enn ikki hava fingið upplýst teirra ÁKK.

## Kostnaðarpostar

**2 – Umsitingar- og nýtekningarkostnaðir, sbrt. rakstrarroknskapinum**

Posturin stemmar við "Rakstrarkostnaður av tryggingarvirksemi fyri egna rokning" í ársfrásøgnini hjá Betri Pensjón. Lutfalsligi parturin av umsitingar- og nýtekningarkostnaðunum, ið hoyra til ikki viðkomandi avtalur, er deildur eftir teirra parti av tryggingargjøldunum. Kostnaðir, ið hoyra til ikki viðkomandi avtalur, eru kostnaðir viðvíkjandi váðaavtalum, ið ikki eru atknýttar eini eftirlønarskipan.

**3 – Leiga av egnum skrivstovubygningi**

Posturin er óviðkomandi fyri Betri Pensjón.

**4 – Kostnaðir til tryggingarmiðlarar**

Posturin er óviðkomandi fyri Betri Pensjón.

**5 – Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi í dótturfeløgum**

Posturin er óviðkomandi fyri Betri Pensjón.

**6 – Umsitingarkostnaðir hjá uttanhýsis veitarum av av tryggingartænastum**

Posturin er óviðkomandi fyri Betri Pensjón.

**7 – Umsitingar- og nýtekningarkostnaðir viðvíkjandi SVL-tryggingum, sbrt. rakstrarroknskapinum**

Posturin sæst undir ”Tryggingartekniskt úrslit av sjúkra- og vanlukkutryggingarvirksemi” í notu 7 í ársfrásøgnini hjá Betri Pensjón. Tann lutfalsligi parturin av SVL-kostnaðum, ið hoyrir til ikki viðkomandi avtalur, er deildur eftir teirra parti av tryggingargjøldunum. Ikki viðkomandi avtalur posturin inniheldur tann partin av SVL-kostnaðum, ið ikki eru atknýttir eini eftirlønarskipan.

**8 – Yvir-/undirskot av umsitingar- og nýtekningarkostnaðum, sum fellur til kjarnufæfeingi (mótrokningarpostur)**

Posturin vísir yvir-/undirskotið av umsitingar- og nýtekningarkostnaðunum hjá kjarnufæfeinginum í posti nr. 2 og nr. 7. Ikki viðkomandi avtalur inniheldur kostnaðir viðvíkjandi váða- og SVL-tryggingum, ið ikki eru atknýttar eini eftirlønarskipan og har kostnaðurin verður rindaður av kjarnufæfeinginum.

**9 – Íløgukostnaðir, sbrt. rakstrarroknskapinum**

Posturin inniheldur umsitingarkostnaðir í sambandi við íløguvirksemi, sum sæst í rakstrarroknskapinum í ársfrásøgnini hjá Betri Pensjón.

**10 – Aðrir íløgukostnaðir í grunnum, dótturfeløgum, íløgufeløgum o.ø.**

Posturin vísir uttanhýsis kostnaðir hjá goymsluumsitarum felagsins og inniheldur umsitingar- og handilskostnaðir, ið verða trektir av avkastinum, áðrenn hetta verður tilskrivað. Til uppgerðina í avstemmingartalvuni eru kostnaðartølini, í DCI (Dokument med Central Information) hjá íløgufeløgunum sbrt. PRIIP-reglunum, nýtt.

**11 – Yvir-/undirskot av íløgukostnaðum, sum fellur til kjarnufæfeingi (mótrokningarpostur)**

Posturin inniheldur yvir-/undirskot av íløgukostnaðunum, ið verða rindaðir av kjarnufæfeinginum.

**12 – Íløguskotnaðir, sum hoyra til kjarnufæfeingi (mótrokningarpostur)**

Posturin vísir tann partin av íløgukostnaðunum (”Fyrisitingarkostnaður av íløguvirksemi” sbrt. ársfrásøgnini fyri Betri Pensjón), ið eru atknýttir kjarnufæfeinginum. Tær samlaðu íløgurnar stava frá antin innskot frá kundunum ella frá kjarnufæfeinginum. Kjarnufæfeingi er roknað sum tann lutfalsligi parturin.

**13 – Váðarenting, íroknað javning av skuggakontum**

Posturin er óviðkomandi fyri Betri Pensjón.

**14 – Gjald fyri trygdir**

Posturin er óviðkomandi fyri Betri Pensjón.

**15 – Kostnaðarúrslit**

Posturin er óviðkomandi fyri Betri Pensjón.

**16 – Aðrir kostnaðir, sum kunnu útgreinast**

Posturin er óviðkomandi fyri Betri Pensjón.

**17 – Javning av kostnaðum fyri undanfarin ár**

Posturin er óviðkomandi fyri Betri Pensjón.

betri pensjón

# Avstemmingartalva

| Nr. | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 1a | Summurin av ÁKK upplýst kundunum | | | | 16.901 |
| 1b | Summurin av ÁKK býtt út á kundar, sum antin eru farnir úr felagnum, ella har eftirlønarskjalið er skrásett sum endað. | | | | 133 |
| 1c | Summurin av ÁKK fyri avtalur, har ÁKK ikki er viðkomandi | | | | 2.065 |
| 1d | Summurin av ÁKK, sum enn ikki er upplýst | | | | - |
| **1** | **Summurin av ÁKK til kundarnar** | | | | **19.100** |
| | | | | | |
| **Nr.** | **Kostnaðarpostur** | **Miðal-renta** | **Marknaðar-renta** | **Ikki viðkomandi avtalur** | **Samanlagt** |
| 2 | Umsitingar- og nýtekningarkostnaðir, sbrt. rakstrarroknskapinum | - | 13.875 | 2.070 | 15.945 |
| 3 | Leiga av egnum skrivstovubygning | - | - | - | - |
| 4 | Kostnaðir til tryggingarmiðlarar | - | - | - | - |
| 5 | Rakstrarkostnaðir av tryggingarvirksemi í dótturfeløgum | - | - | - | - |
| 6 | Umsitingarkostnaðir hjá uttanhýsis veitarum av tryggingartænastum | - | - | - | - |
| 7 | Umsitingar- og nýtekningarkostnaðir viðvíkjandi SVL-tryggingum, sbrt. rakstrarroknskapinum | - | 240 | 698 | 938 |
| 8 | Yvir-/undirskot av umsitingar- og nýtekningarkostnaðum, sum fellur til kjarnufæfeingi (mótrokningarpostur) | - | -4.486 | -703 | -5.189 |
| 9 | Íløguskostnaðir, sbrt. rakstrarroknskapinum | - | 3.329 | - | 3.329 |
| 10 | Aðrir íløgukostnaðir í grunnum, dótturfeløgum, íløgufeløgum o.ø. | - | 7.406 | - | 7.406 |
| 11 | Yvir-/undirskot av íløgukostnaðum, sum fellur til kjarnufæfeingi (mótrokningarpostur) | - | -3.236 | - | -3.236 |
| 12 | Íløgukostnaðir, sum hoyra til kjarnufæfeingi (mótrokningarpostur) | - | -93 | - | -93 |
| 13 | Váðarenting, íroknað javning av skuggakontum | - | - | - | - |
| 14 | Gjøld fyri trygdir | - | - | - | - |
| 15 | Kostnaðarúrslit | - | - | - | - |
| 16 | Aðrir kostnaðir, sum kunnu útgreinast | - | - | - | - |
| 17 | Javning av kostnaðum fyri undanfarnin ár | - | - | - | - |
| **18** | **Tilsamans** | **-** | **17.034** | **2.065** | **19.100** |
| | | | | | |
| **19** | **Postur 1 minus 18** | | | | **0** |